Sølufólk

Fyri Snørisvirkið í Klaksvík søkja vit eftir dugnaligum fólki til at taka sær av søluarbeiðinum. Fyritøkan selur fiskireiðskap og sjó- og arbeiðsklæði til fiskivinnu á sjógvi og landi, og annars til virkir og fólk sum heild. Á fyritøkuni starvast í dag 5 fólk.

Uppgávur:

Starvið er fjølbroytt, og kemur viðkomandi bæði at selja yvir disk og á annan hátt. Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum hesar:

- at aktivt seta seg í samband við møguligar kundar bæði skrivliga og við kundavitjanum
- at samskifta við kundar, sum venda sær til fyritøkuna
- at veita kundum, ið koma inn í handilin eina góða ráðgeving og tænastu
- at verða við til, saman við leiðsluni at leggja marknaðarætlanir fyri fyritøkuna

Umsøkjarar:

Vit søkja eftir einum persóni, sum er positivur, dámar væl og hevur evni at samstarva við onnur og annars er ágrýtin og hevur gott hugflog. Samstundis vænta vit, at viðkomandi dámar væl at arbeiða sjálvstøugt og miðvíst og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum. Umsøkjarar við royndum innan sølu og í nýtslu av teimum mest vanligu telduforritunum hava fyrimun, men hetta er tó ongin treyt.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Umsóknir verða sendar skjótast gjørligt, og í seinasta lagi fríggjadagin 23. november 2001 til: **Virkisráðgeving Spf., Boks 26, 600 Saltangará.** Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Virkisráðgeving Sp/f, tlf. 44 95 91 og tosa við Sigvør Laksá ella Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Virkisráðgeving Spf

Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - **Rekruttering** - Góðsku-/Umhvørvisskipanir
Heimasíða: http://www.konsult.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 563, P/F Føroyabók, 700 Klaksvík.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Daniel Petur Nielsen, Kjalarvegur, 700 Klaksvík.
Innkomin í nevndina: Henrikka Nielsen, Vágstún 2, 700 Klaksvík.

Skráseting Føroya tann 20. september 2001

Kristin Balle

Høvuðsreingerð
Frá A til Z til
Fyritøkur, Stovnar, Skúlar, Privat, Skip
Teppireins, Bona G lv,
Fastar avtalur til vinnulívið
Vaskarí & Reingering
Kvalitets reinger s ani 198
Tel • 21 13 12 • 31 63 00

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2707, Sp/f Injector International, 900 Vágur.

Viðtøkur broyttar:
08.07.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 1.617.500,00 til kr. 2.000.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 1.617.500,00 til kurs 100.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Niels Johannesen, Pætursgøta 13, 188 Hoyvík (formaður).
Innkomin sum formaður: Páll Petersens, 180 Kaldbak.
Innkomin í nevndina: Jóna Bára Midjord, 900 Vágur.

Skráseting Føroya tann 20. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2588, Sp/f Fjallið, 730 Norðdepil.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Byrger Heinesen, Á Brekku, 700 Klaksvík.
Innkomin í nevndina: Osla Sørensen, 730 Norðdepil.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Byrger Heinesen, Á Brekku, 700 Klaksvík.
Innkomin sum stjóri: Olaf Mathias Sivertsen, 730 Norðdepil.

Skráseting Føroya tann 20. november 2001

Kristin Balle

Keypssamtøkan í Hoyvík

Søkt verður eftir fólki, til at røkja frukt- og grønmetisdeildina í keypssamtøkuni, at byrja beinanvegin ella skjótast tilber.

Tann, ið settur verður, má vera røkin og álítandi. Tað er ein fyrimunur, men eingin treyt, um viðkomandi hevur royndir innan økið.

Talan er um fulltíðarstarv.

Løn sambært sáttmálað við S&K.

Meiri fæst at vita um starvið hjá Bent Lundsgaard tlf. 314149.

Umsókn skal sendast til FK Hoyvík, boks 349, 188 Hoyvík.

Keypsamtøkan í Hoyvík

Sosialurin
-tað loysir seg

Skúlaleiðari til Skála skúla

Av tí at skúlaleiðarin fer í farloyvi 1 ár (frá 1. januar 2002 til 1. januar 2003) verður søkt eftir avloysara í tíðaravmarkað starv hetta tíðarbilið.

Nærri fæst at vita, hvørjar skyldur eru at røkja við at ringja til skúlaleiðaran tlf. 441368 (skúlin) ella 441539 (heima) ella við at senda teldupost til sunik@skulin.fo

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 27.4 – 31.2.

Skrivlig umsókn skal vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. november 2001 kl. 18.

Skúlastýrið fyri Skála skúla
Rosa Prestá, formaður
FO 480 Skála
tlf. 441040

Eftirlitsmaður

Søkt verður eftir eftirlitsmanni til setan fyrst í komandi ári.

Uppgávan:
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum, sum verða boðað til sýn. Starvið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verða røkt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini.

Førleikakrøv:
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraútbúgving og hollum royndum innan økið. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur royndir sum lastbilamekanikari.
Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt.
Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

Setanartreytir:
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri. Setanin er treytað av endaligari játtan.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Búgva Apol, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. desember 2001.

Bileftirlit Føroya
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum og hevur sum endamál at fremja akfaatøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 17 fólk.

| | | |